

*Birgir Sigurðsson og hinir í I AM vunnu fyrra innleiðandi umfarið av Gospel Prixnum*

*Mynd: Maria Olsen*

# I AM gjørdist fyrsti vinnarin

**Leygarkvøldið var fyrsta umfarið av Gospel Prixnum hildið. 300 áskoðarir høvdu funnið leiðina til Mentanarhúsið, har fýra teir fyrstu gospelbólkarnir kappaðust um finalupláss. Hetta kvøldið gjørdist eitt fantastiskt kvøld við góðum tónleiki og góðum stemningi**

GOSPEL PRIX
*Henny Olsen*

- Um tit ætlað tykkum at buha, so skulu tit gera tað, áðrenn hetta byrjar, tí tað er ikki loyvt at buha eftir bólkunum. Um tit gera tað, so verða tit koyrd út, tí her ganga also vaktir runt.

Hetta vóru tey eitt sindur skemtiligu boðini, ið allir áskoðarirnir fingu, tá Gospel Prixið fór í gongd leygarkvøldið. Hetta tiltakið er heilt nýtt, men sum Eyðun Jacobsen, ein av fyriskiparunum, sigur, so er hetta kanska eitt alternativ til tað væl kenda Prix Føroyar.

Hetta tiltakið var fyrstu ferð í huganum á fyriskiparunum fyri mánaðum síðani. Tey vildu hava eitt tiltak, sum snúði seg um Gud og gospeltónleik. Síðani fóru tey undir at fyriskipa tiltakið og spyrja seg fyri.

Áhugin fyri tiltakinum var stórur beinanvegin. Fleiri hildu hetta vera eitt gott hugskot og ein avbera góður møguleiki at koma út tí, sum lá teimum á hjarta.

### Bara ein stuðul

Peningaliga er tiltakið næstan ein syrgisøga. Fyriskiparirnir søktu um stuðul frá 30 fyritøkum, men fingu bert stuðul frá einari, Vónini. Sjálv eru tey ikki so kedd um úrslitið, tvørturímóti. Tey fingu fyri tað mesta positiv svar frá fyritøkunum, men tíverri kundu hesar fyritøkur ikki geva peningaligan stuðul.

Gospel Prix verður skipað á líknandi hátt sum Prix Føroyar. Tiltakið er býtt í tvey undanumfør, har nummar 1 og 2 fara víðari í finaluna. 4 bólkar verða so í finaluni, har kappast verður um eina uttanlandsferð til ein festival, studiotímar og pening til tónleikaútgerð.

### Rættiligt lív í

Umfarið, sum var leygarkvøldið, gekk sera væl.

Um 300 áskoðarir vóru og lurtaðu, meðan heili 100 hjálparfólk gjørdu sítt til, at tiltakið varð, sum tað skuldi. 300 áskoðarir ljóðar ikki av nógvum, men inni í Mentanarhúsinum var so góður stemningur, at tað lættliga kundi lumpa. Har var rópað, klappað, sungið og alt tað, sum hoyrir einum prixi til.

Bólkarnir til hetta umfarið vóru Trace, Scot, Direct level og I AM.

Allir vóru teir væl bakkaðir upp, og ikki kundi sigast áðrenn, hvør vinnarin fór at verða. Frá fyriskiparinum frættist, at kappingin var heilt einastandandi tøtt, men tað gjørdist I AM, sum dróg longsta stráðið. Teir eru nú á veg til finaluna, har eisini tvey´arin Direct Level verður at hoyra.

I AM kláraði við sínum royndum at fáa rættiligt liv í áskoðarnar. Við sangum sum "Believe" fingu teir alla áskoðarafjøldina at hoppa og syngja við.

Teir vóru tó heilt yvirraskaðir av at vinna og søgdu, at hinir bólkarnir vóru heilt suverenir. Teir tóku eitt nú Scot sum dømi, har tvey mannfólk bara við røddum sínum og einum guitara, fingu áskoðararnar at droyma seg langt burtur til eksotisk lond.

### Dansibólkar á pallinum

Dømingin er eisini skipað sum Prix Føroyar. 6 dómarir gingu anonymir runt, og eingin visti rættiliga, hvørjir hesir vóru. Hesir eru allir millum 20- 30 ára aldur, og kunnu við arbeiðum sínum kvalifiserast. 4 av teimum eru tónleikarar, ein er solistur og ein er ljóðteknikari.

Í Mentanarhúsinum var ikki bara tónleikur á skránni. Meðan dómarirnir sótu við sínum blokkum og samráddust, vóru tríggir dansibólkar á pallinum. Hesir bólkarnir, sum eru Jump, A2J og Colour, halda til dagliga til í Kelduni. Hesir dansibólkar mintu nógv um amerikansku hiphop- dansararnar, men sum við øllum øðrum hetta kvøldið, so var endamálið við hesum eisini at boða um Guðs orð. Hetta fekk eisini lív í tað spentu fjøldina, sum stóð og bíðaði eftir úrslitinum.

Næsta umfar verður 27. september, har bólkarnir fara at kappast um tey seinastu plássini í finaluni. Braquet, Crescendo, In Getsemane, Thirst og Credo taka tá yvir, og hetta verður nokk ikki so ringt.

Við tí somu áskoðarafjøldini sum var nú leygarkvøldið, sær tað longu út til at blíva eitt heilt fantastiskt kvøld við góðum tónleiki og góðum stemningi. Finalan verður 11. oktober, og eru nógv longu farin at telja niður.



*Direct Level vann sær eisini pláss í finaluni*

*Mynd: Maria Olsen*



# Madonna er smikrað av føroyskari útgávu



*Madonna spurdi um Føroyar, tá ið hon hitti Sosialin í París*

*Mynd: Ingi Rasmussen*

**Tað er ein æra, at hennara bók kemur út á føroyskum, segði Madonna á einum stórslignum tíðindafundi í París mánadagin, har øll heimspressan var til staðar. Hon noyddist at svara meiri og minni ágangandi spurningum, men dugdi væl at benda samrøðuna inn á tað, sum alt snúði seg um: Barnabókina »Ensku rósurnar«**

MADONNA
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

**Sosialurin, París:** »I am flattered. Delighted.«

Madonna spardi ikki lýsingarorðini, tá Sosialurin spurdi hana, hvat henni dámdi, at hennara barnabók eisini er útkomin á føroyskum, ið er nógv tað minsta málið, bókin er týdd til. Hon helt tað vera ein æra, hon er glað og smikrað, segði hon bart út.

Hon spurdi, hvar Føroyar lógu, og tá hon fekk fortalt, at tær lógu miðskeiðis í Norðuratlantshavinum og høvdu smáar 50.000 íbúgvar, skemtaði hon, at so fór bókin helst at selja 50.000 eintøk í Føroyum.

Hon fekk láturin fram í stóru fjøldini av tíðindafólkum, sum var komin saman í París at fylgja við, tá fyrsta barnabók hennara av fimm, »English roses«, kom á gøtuna. Og yvirhøvur vísti Madonna, at hon er ein umhugsin og kvik kvinna, sum ikki er soleiðis at taka av fótum. Hóast spurningarnir mangan vóru bæði naskir og tápuligir, so dugdi hon væl at svara fyri seg og prógvaði, at hon hevur bæði dýbd og fynd.

### Fjepparar og tíðindafólk

Talan er um ta størstu verkætlanina av sínum slagi nakrantíð verður sagt.

Samprent er vanligt í dag, men tað sigst, at ongantíð áður er ein bók útkomin á 30 málum í 100 londum í einari millión eintøkum samstundis.

Mándagin seinnapartin var bókin alment løgd fram. Tað hendi í bakandi sól í París á sjálvum Hotel Ritz. Minni kundi ikki gera tað. Hóast lovað var, at tíðindafundurin skuldi byrja klokkan 16, kom Madonna ikki fram fyrr enn ein lítlan tíma seinni. Sum ein røtt Primadonna.

Fjepparar í stórum tali stóðu og royndu at fáa eina mynd ella eitt orð frá megastjørnuni, og heimspressan var væl mannað á tíðindafundinum. Trygdin var í hásæti, og áðrenn vit komu fram til sjálvt fundarhølið, skuldu vit ígjøgnum tríggjar eftirlitsstøðir.

At Madonna hevur stjørnustatus og er ein fyrimynd hjá nógvum vitnaði atburðurin hjá einari franskari tíðindakvinnu. Hon staðfesti, at hon elskaði Madonnu og vildi geva henni eina gávu. Tá hon ikki slapp framat, gjørdist hon ómøgulig. Madonna svaraði róliga aftur, at hon kundi vísa sín kærleika við at tiga. Men tá tað ikki eydnaðist, var hon blakað út. Á vegnum út rópti hon, at hon vildi bara mussa Madonnu. Nú er hon uppsøgd.

### Moralskur boðskapur

Spurningarnir vóru nógvir til Madonnu, sum gjørdi sítt til at svara ágangandi pressuni, sum var alvápnað við myndatólum og skriviblokkum.

Sjálvandi slapst ikki undan, at dyrgt var eftir, hvussu provokatørurin, sum hevur skakað, provokerað og skrivað bókina »Sex«, fullkomiliga kann skifta stíl og skriva moralskar barnasøgur.

– Eg havi bara fylgt tí vegnum, sum mítt lív er gingið. Tá eg skrivaði bókina »Sex« var eg á einum staði í lívinum, har eg vildi flyta mørk og granskaði meg sjálva. Eg hevði rætt og slætt áhuga fyri mær sjálvum og dámdi at vísa meg fram. Nú havi eg fingið børn, og tá broytist alt sjálvandi. Sum mamma havi eg áhuga fyri øðrum enn mær sjálvum og hyggi at børnum, segði Madonna. Madonna duldi ikki, at íblásturin til bókina stavar frá hennaragransking av Kabbalah trúnni.

– Kabbalah snýr seg um, at tað er ein lívgevandi kelda, sum kann vera Gud. Hvør av teimum fimm bókunum snúgva seg um, hvussu vit kunnu missa sambandið við ta kelduna. Í fyrstu bókini snýr tað seg um øvundsjúku, sigur Madonna.

Við fyrsta gjøgnumlestri av bókini er kortini skjótt at staðfesta, at hon ikki er nøkur religiøs bók. Heldur er talan um eina ævintýrkenda bók við einum sterkum morali. Bókin er væl og einfalt skrivað og er lætt lisin frá børnum úr seks árum uppeftir.

Hóast nøkur slaturkend tíðindafólk vildu snúgva prátið inn á slík evni, sum hví hon kysti poppgenturnar, so helt Madonna seg fast til bókina. Í bókini vísir tað seg, at Bina, sum hinar genturnar øvunda, onga mammu hevur og hevur úr at gera at hjálpa pápa sínum. Tað fekk ein journalist at spyrja, hvussu tað var at vera móðurleys sum barn.

– Tað var hart. Eg føldi ein stóran sakn og sorg. Men tað gjørdi meg eisini til tann yvirlivaran, eg nú eri, segði Madonna, sum soleiðis dugdi at vinna sær hjørtuni hjá sjálvt teimum mest kritisku.